## Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 02. okt. 2014

Møttir: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul frá Bláa Krossi.** | Til 1:<br>Samtykt varð einmælt ikki at stuðla. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til námsferð frá 3. flokki í Miðnámsskúlanum.** | Til 2:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 2.000,-. |
| **Mál 3:**<br>**Avtala við Landsverk um vetrarhald 2014/2015.** | Til 3:<br>Samtykt varð at taka undir við avtaluni, men at Toftavegur verður tikin burturúr og Heiðavegur og Klettagøta í Sandvík verða tikin við í avtaluna ístaðin. |
| **Mál 4:**<br>**Skriv frá Rúna Thomsen um heitan pott á Bíargarði.** | Til 4:<br>Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin kannar málið nærri til komandi fund. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 403a, Sandvík.** | Til 5:<br>Samtykt varð at geva undantaksloyvi til sundurbýti við tí grundgeving, at arbeitt verður við teksti til nýggja byggisamtykt, har ætlanin er at áseta minstuvídd á landbúnaðarjørð til 3.000 m2 við sundurbýti. |
| **Mál 6:**<br>**Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.** | Til 6:<br>Tekniska nevnd:<br>01) Skriv / klaga frá borgara viðv. súrhoyggjabrunni.<br><br>Vega- og havnanevnd:<br>02) Skriv viðv. neystagrund v.m.<br>03) Skriv viðv. vatni, ið rennur av vegnum inn í tún.<br>04) Ljósviðurskiftini á Bíargarði.<br>05) Frárensl frá neysti á Bíargarði.<br><br>Trivnaðarnevnd:<br>06) Hv. skúli - samvirknar talvur til skúlastovurnar |

| | |
|---|---|
| | í niðaruhædd.<br>07) Hv. skúli - svimjing og lektiukafé.<br>08) Hv. skúli - skrivstovuhjálp fyri 2015.<br>09) Skriv frá dagrøktarunum viðv. ansing í summar-frítíðini.<br>10) Barnaansing í Hv. Kommunu - kostnaður v.m.<br>11) Kunning/skriv frá heilsufrøðingi. |
| **Mál 7:**<br>**Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.** | Til 7:<br>Tekniska nevnd:<br>01) Klaga viðv. súrhoyggjabrunni: Tekniska nevnd fer á staðið og kannar málið.<br><br>Vega- og havnanevnd:<br>02) Neystagrund v.m.: Samtykt varð at siga frá, at viðv. neystagrundini er gongd í málinum. Viðv. vegnum, vendir nevndin aftur til hetta.<br>03) Viðv. vatni, ið rennur av vegnum: Samtykt varð at beina málið í Teknisku nevnd.<br>04) Ljósviðurskiftini á Bíargarði: Samtykt varð at seta eitt gøtuljós upp.<br>05) Frárensl frá neysti: Samtykt varð at geva loyvi til at bróta ein part av betonginum upp frammanfyri hurðini. Viðv. frárensli varð samtykt, at kommunan letur tilfarið við at teir gera arbeiðið sjálvir.<br><br>Trivnaðarnevnd:<br>06) Skriv frá Hv. skúla: Kunnað varð um, at Trivn-<br>til aðarnevndin tekur hesi mál upp, áðrenn fíggjar-<br>08) lógin kemur fyri.<br>09) Skriv frá dagrøktarunum: Málið varð útsett.<br>10) Barnaansing - kostnaður: Útrokning hesum viðvíkjandi verður gjørd. |
| **Mál 8:**<br>**Ikki alment mál.** | Til 8:<br>Eitt mál um leigu ella keyp av grundøki. |